# VÍÐGONGDA MANNMINKAN ELLA ALTJÓÐA **MANNARÆTT**

**TRONGSKYGDIR** BORGARAR OG **POLITIKARAR** FARA ALTÍÐ AT SIGA SÍNA **HUGSAN**, OG FÓLK SUM **JENIS AV RANA** SKULU EISINI HAVA RÆTT AT **TALA FRÍTT**. MEN VERULEIKIN ER, AT **FØROYINGAR** Í LØTUNI VERÐA **ÚTHONGDIR** Í HEIMSPRESSUNI SUM **ÓGESTABLÍÐIR HOMOFOBAR** OG VÍÐGONGDIR **ØRVITISKNOKKAR**. VIT EIGA AT **STAÐFESTA** Í OKKARA NÝGGJU **STJÓRNARSKIPAN**, AT Í FØROYUM ER **RÚM FYRI ØLLUM**, OG VIÐ LÓGINI Á LOFTI VÍSA **UMHEIMINUM**, HVAT OKKARA VERULIGA **VIRÐISGRUNDARLAG** ER



**KRONIKK**

Uni Arge
ua@sosialurin.fo

Formaðurin í Miðflokkinum hevur aftur gjørt tað. Hann hevur politiskt markerað seg við at seta niður á samkynd, fornermað íslendsku tjóðina og sett Føroyar í ringt ljós kring allan heim. Heilt úr USA umvegis Ísland til Póllands skriva fjølmiðlar við einum láturbrøli, at í lítlu Føroyum eru summi so homofobisk, at tey uttan at skammast háða oddakvinnuna í einum sjálvstøðugum stati fyri hennara kynsligu sannføring.

Í Íslandi fór søgan sjálvandi upp á allar tíðindabreddar. Í ríkissjónvarpinum týskvøldið var langt innslag um mótmælið hjá Jenisi av Rana ímóti Jóhonnu Sigurðardóttir og konu hennara, Jóninu. Ríkissjónvarpið tosaði við Øgmund Jónasson, altingsmann, sum mælti íslendingum frá at døma allar føroyingar í málinum. Eisini Steingrímur Sigfússon, fíggjarmálaráðharri, undraðist á útsøgnina hjá føroyska tingmanninum og harmaðist vegna føroyingar um málið.

Íslendska sjónvarpið hevði eisini spurt fólk í Havn, hvat tey hildu. Av teimum seks, ið spurd vórðu, hildu øll, at formaðurin í Miðflokkinum var farin langt út um mark. Vit eru øll javnlíkar og skulu viðfarast javnt, segði ein. Men úr íslendskum fjølmiðlum er søgan um Jenis av Rana og Jóhonnu Sigurðardóttir farin víða um heim. Ísland er sjálvstøðugt ríki, og tá landsins leiðari er fyri tílíkum persónligum álopi, bera útlendskir sendiharrar og tíðindamenn sjálvandi søguna víðari.

> *Hetta signalerar ikki tað normala sambært skriftunum, so eg hevði ikki droymt um at farið til ein sovorðnan døgurða.*
>
> Jenis av Rana

### Mótmælti tí ónormala

Jenis av Rana segði í útvarpstíðindunum hjá Kringvarpinum týsdagin, at hetta, hann hevði sagt upprunaliga, var ikki so álvarsligt. Hann skuldi einans hava sagt, at hann tímdi ikki út um kvøldarnar, tí hann var so ofta úti annars, og hetta skuldi so vera orsøkin til, at hann ikki vildi fara til Kirkjubøar at eta døgurða saman við Jóhonnu Sigurðardóttir og konu hennara. Men hetta var ikki heilt satt.

Fyrsta útsøgn hansara stóð á Vágaportalinum mánadagin. Jenis av Rana hevur ikki tikið frástøðu frá útsagnunum har ella hildið uppá, at hann er skeivt endurgivin, og tí hevur hann orðarætt eftir Vágaportalinum sagt hetta: »Vanliga fari eg ikki út um kvøldarnar, uttan so at konan er boðin við, so velji eg heldur at vera heima hjá henni, og hetta hevur verið soleiðis í mong ár, so hetta er ikki nakað nýtt.«

Síðan segði hann: »Men tá ið tað er sagt, so skal sigast um hesa innbjóðingina frá løgmanni til døgurðan í sambandi við vitjanina hjá íslendska forsætismálaráðkvinnuni við makanum frú Jóninu, at eg fór ikki kortini, um so konan hevði verið boðin við eisini. Hetta er nógv meira alvorligt enn sum so, og hetta signalerar ikki tað normala sambært skriftunum, so eg hevði ikki droymt um at farið til ein sovorðnan døgurða.«

Hetta var útsøgnin, sum fekk heimspressuna at varpa ljós á Føroyar, og hetta var tað, formaðurin í Miðflokkinum veruliga meinti. Íslendski forsætisráðharrin og hennara kynsliga sannføring umboðaðu ikki tað normala, og tí kundi Jenis av Rana ikki eta døgurða saman við henni og konuni, hóast Jesus ikki himpraðist við at sita til borðs saman við nøkrum. Kundi rok væntast av hesi útsøgn? Sjálvandi.

Síðan hevur Jenis av Rana sagt við Politiken, at hann hevur Føroya fólk við sær í málinum. Hann hevur víst á, at tveir aðrir floksformenn, Jørgen Niclasen og Kári P. Højgaard, eisini mótmæltu døgurðanum í Kirkjubø, hóast teir hava víst á aðrar grundgevingar enn tær hjá Jenisi av Rana. Við øðrum orðum roynir hann at siga, at hann umboðar meirilutan í Føroyum.

### Fólkaræðislig vøgga

Í sjálvum sær er hetta ein áhugaverdur pástandur, sum er verdur at bjóða av, og tann møguleikin er nú til staðar, at okkurt skilagott kann spyrjast burtur úr tí skomm, sum hetta málið hevur fingið nógvar føroyingar at kenna djúpt í sínum gestablíðu hjørtum.

Orsøkin til, at mong gerast so fúkandi óð um menniskjasýnið hjá Jenisi av Rana, er, at tey flestu halda seg búgva í einum toluliga upplýstum og tolsomum samfelag við eini ávísari fólkaræðisligari hevd. Men kanska er hetta ikki so. Kanska liggja føroyingar enn í eini fólkaræðisligari vøggu og